# Landsstýrið leggur seg ikki út í, um kommunur leggja saman ella velja at samstarva

**- Tær uppgávur, sum lagdar verða út til kommunurnar, krevja størri umsitingarligar royndir. Tí ynskja vit, at samstarvað verður um hesi økir, so tey kunnu umsitast á skilagóðan og gagnligan hátt, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum umsat kommunumál í fýra ár**

ATKVØÐUGREIÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Tað eru ikki so mong ár síðan, at landsmyndugleikarnir løgdu seg út í viðurskiftini hjá kommununum og meira ella minni vildu kroysta tær til at samstarva ella leggja saman.

Hóast umsitingarligi parturin hjá kommununum er vaksin seinastu árini og fer at veksa enn meira, tá ið eldraøkið eisini verður lagt út til kommunurnar at umsita, eru røddirnar í landsstýrinum nú meira mildar.

Tað var Anfinn Kallsberg, ið umsat kommunumál, sum fyri fimm árum síðan setti út í kortið av nýggjum, soleiðis at eingin tvungin samanleggin verður.

Tað var Høgni Hoydal, sum tók yvir kommunumál, tá ið Anfinn slepti fyri einum ári síðan.

## Eingin uppiblanding

Nú veljarar í seks kommunum í norðrara parti av Streymoy og Eysturoy týsdagin atkvøddu um samanlegging, harav meiriluti fyri samanlegging var í teimum fimm, sigur løgmaður, Anfinn Kallsberg, at landsstýrið fer ikki at leggja seg út í, um kommunur velja at leggja saman ella at samstarva.

- Hetta er ein spurningur, sum fólkið í kommununum sjálvt skal taka støðu

til. Ynskja kommunur at leggja saman, fara vit ikki at nokta teimum tað. Vit hava gjørt eina nýggja kommunulóg og eina lóggávu fyri samanlegging, um tað verður gjørt, men tað er fult og heilt upp til fólkið í kommununum, hvussu tær skipa seg við samstarvi ella samanlegging.

Løgmaður vísir á, at jú fleiri økir verða løgd út til kommunurnar at umsita, tess fleiri umsitingarligar royndir krevur hetta.

- Málið er at veita eina nøktandi tænastu til borgararnar, og tí er avgjørt

neyðugt, at samstarvað verður um hesi økir. Skulu kommunurnar umsita fleiri økir, krevst eisini, at tær eru førar fyri at lyfta hesa uppgávuna.

## Innlýsandi samstarv

Anfinn Kallsberg sigur, at tá ið kommunurnar samstarva á mongum økjum, soleiðis sum gjørt hevur verið í eitt nú Sundalagnum, er væntandi, at spurningurin um samanlegging við tíðini gerst aktuellur, tí spurningurin verður at enda, hvussu nógv mál liggja uttanfyri samstarvið.

- Sjálvur havi eg alla tíðina rokna við, at samstarv ella samanlegging millum kommunur fer at verða gongda leiðin, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Hann vísir á, at eldraøkið, sum leggjast skal út til kommunurnar at umsita, krevur, at samstarvað verður, soleiðis at vit fáa eina góða og nøktandi skipan, sum fer at tæna borgarunum kring landið.



*- Eg havi alla tíðina roknað við, at samstarv ella samanlegging millum kommunur fer at verða gongda leiðin, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum umsat kommunumál í fýra ár*

# Vit hava onga áheitan fingið um samanlegging

**- Eg dugi ikki at siga, hvat hevur staðið øðrum bygdaráðum á Eiði í boði, men sitandi bygdaráð hevur onga innbjóðing fingið um at verða við í samanleggingini – ei heldur í víðkaðum samstarvi millum kommunurnar, sigur Tordur J. Niclasen, bygdaráðsformaður á Eiði**



SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*

- Eg dugi ikki at siga, um vit vildu verið við í samanleggingini ella ikki. Men sitandi bygdaráð hevur so einki høvi fingið til tess. Vit hava onga innbjóðing fingið um at vera við í sameiningarbólkinum, sum tær seks kommunurnar, ið atkvøddu um samanlegging týsdagin, hava havt sitandi.

Bygdaráðsformaðurin á Eiði, Tordur J. Niclasen, vísir til úttalilsini hjá Heðini Zachariassen, bygdaráðsformanni í Hvalvík, sum hevur sagt, at Eiðis kommuna er boðin at vera við í samstarvinum við hinar kommunurnar.

*- Vit fara framhaldandi at húsast innan teir karmar, vit hava, sigur Tordur J. Niclasen, bygdaráðsformaður á Eiði, sum annars er áhugaður og heldur tað vera neyðugt við góðum samstarvi, nú fleiri økir skulu leggjast út til kommunurnar at umsita*

- Vit mugu ikki blanda tingini saman. Tað, sum Heðin sipaði til, er samstarv og ikki samanlegging.

## Samstarv alneyðugt

Tordur leggur dent á, at Eiðis bygdaráð hevur ikki havt møguleikan at leggja málið um samanlegging út til fólkaatkvøðu, tí sitandi bygdaráð hevur ikki fingið møguleikan at vera við í sameiningarbólkinum. Ei heldur hava hinar kommunurnar, sum vóru við í sameiningarbólkinum, vent sær til Eiðis bygdaráð um víðkað samstarv.

- Men vit eru avgjørt áhugaðir fyri gagnligum samstarvi við hinar kommunurnar, og vit halda eisini, at vit hava nakað at bjóða suðureftir – eftir nærri fyrisettum avtalum, sum Tordur tekur til.

Tordur vísir á, at nýggj ítróttarhøll júst er bygd á Eiði, og hann heldur, at henda íløga átti at komið øllum økinum til gagns. Á Eiði er eisini fótbóltsvøllur, sum bygdirnar sunnanfyri eisini brúka.

Heilt síðan Felagsskúlin á Oyrarbakka varð bygdur, hevur Eiðis kommuna verið við í samstarvinum um skúlan. Annað samstarv millum Eiði og hinar grannabygdirnar er læknin, sum hoyrir til økið.

- Eg haldi, at tað er neyðugt at samstarva, og nú ymiskar uppgávur aftrat skulu leggjast út til kommunurnar at umsita, er hetta alneyðugt – ikki bara her um okkara leiðir, men kring alt landið, har tað annars er møguligt, sigur hann.

## Sum áður

Spurdur, um Eiðis bygdaráð fer at taka nøkur stig, nú fimm kommunur har norðuri í Streymoy og Eysturoy hava gjørt av at leggja saman, sigur Tordur J. Niclasen.

- Nei, tað haldi eg ikki. Vit fara framhaldandi at húsast innan teir karmar, vit hava. Hinvegin er ógjørligt at siga longu nú, hvat henda samanlegging fer at merkja, og hvussu samstarvið millum kommunurnar her í økinum fer at síggja út í framtíðini, sigur bygdaráðsformaðurin á Eiði.



*Hósvík fer í framtíðini at liggja sum ein geiri millum tvær stórar kommunur. Tórshavnar Kommunu sunnanfyri, og Sunda Kommunu norðanfyri*



# Nú er sjálvstýri

**Hósvíkingar valdu sjálvstýri á fólkaatkvøðuni týsdagin. Borgarstjórin, sum var fyri samanlegging við hinum kommununum í Sundalagnum, ásannar, at hann tapti. Hann væntar, at tað verður tungt at fara undir eitt komandi valskeið, tí nógv er, sum skal byggjast upp av nýggjum**

EFTIRVERKIR
*Edvard Joensen*

**Hósvík:** Eitt komandi bygdarráð í Hósvík skal byrja frá botni í fleiri førum. Eitt nú er einki sløkkilið og eingin umhvørvisnevnd í kommununi meira, vísir Jógvan Mørkøre, borgarstjóri á, nú hósvíkingar hava gjørt av at standa uttan fyri ta nýggju, stóru Sunda Kommunu.

Við 81 atkvøðum í móti kommunujsamanlegging, og 71 fyri, gjørdu veljararnir í Hósvík av ikki at fara upp í tað nýggju Sunda Kommunu.

– Tað er so avgerðin hjá fólkinum her, sigur Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í Hósvík. Tað merkir væl, at fólk halda, at tað er gott, sum er. Sjálvur haldi eg tað vera skeiva avgerð at hava tikið, men hon verður so ikki broytt fyri tað, sigur hann.

Jógvan Mørkøre dylur ikki fyri, at hann var fyri samanlegging. Hann heldur, at tað verður øgiliga tungt hjá einum nýggjum bygdarráði, sum skal taka við eftir komandi val, sum verður næsta ár.

– Har vera fleiri ting, sum samráðast skal um av nýggjum. Heilt frá botni av, vísir hann á. Tí Hósvík hevur verið við í kommunalum samstarvi í Sundalagnum í longri tíð, og saman hava kommunurnar fingið fleiri ting upp at standa, sum Hósvíkar Kommuna í framtíðini ikki fer at fáa lut í.

## Kastað burtur

Hósvíkingar kastaðu burtur, nú burðurin var komin á tíð. Nú skal byrjast av nýggjum við at fáa upp at standa slíkt, sum í áravis hevur verið sjálvfylgja, vísir borgarstjórin á.

Serliga tvey dømi tekur hann fram. Annað er sløkkiliðið, og hitt er umhvørvisnevndin.

Um sløkkiliðið sigur hann, at tað kann ikki roknast við, at Hósvíkar Kommuna fær nakað at siga yvir sløkkiliðnum, sum í dag er í Sundalagnum. – Vit hava tikið okkum úr samstarvinum, og skulu vit gera brúk av sløkkiliðnum í framtíðini, mugu vit á knæ at biða um samstarv við tey, sum eiga útgerðina, vísir hann á.

Tó er tað ikki so, at samráðast skal her og nú, um brúk verður fyri tí. Men tá samstarvið formelt heldur uppat, tá valskeiðið er úti, standa vit við ongum, vísir hann á. Og so skal nýggj avtala gerast.

Eitt annað er felags umhvørvisnevndin í Sundalagnum, sum Hósvík nú eisini fer burturúr.

Her mugu hósvíkingar rokna við, at nú er liðugt við sjálvur at seta út í kortið. Í framtíðini er alt, sum bendir á, at nú skal gangast undir tey krøv, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan setir. Og tað skal vera, tá tey verða sett. Í tí førinum verður sjálvstýrið ikki meira enn so, at her kemur kommunan undir umsiting, vísir borgarstjórin í Hósvík á.

Men eisini onnur mál eru, sum koma at merkja framtíðina í Hósvík øðrvísi, enn um lagt varð saman.

Barnagarður verður tungur at fáa nú, væntar Jógvan Mørkøre, men samstarvið um ellis- og røktarheimið í Streymnesi fer so at halda fram kortini, sigur hann. Men tað verður tungt fíggjarliga, tí Hósvíkar Kommuna er bundin av teirri lántøkuni, sum gjørd er. Og henni kemur komandi bygdarráð at knógva undir.

So er tað Felagsskúlin, sum helst eisini einaferð skal byggjast út. Har er Hósvíkar Kommuna eisini uppií. Skal eisini gjaldat fyri lántøku har, fær komandi bygdarráðið ikki pláss fyri nóvum øðrum enn at gjalda lán, fryktar Jógvan Mørkøre fyri.

## Hyggja skeivan veg

Hósvíkingar hugdu skeivan veg týsdagin, staðfestir Jógvan Mørkøre, borgarstjóri. Teir hugdu aftur eftir heldur enn frameftir.

Hann metir, at í summum førum var tað beinleiðis gamalt agg, sum gjørdi av, at tey atkvøddu nei. Slíkt, sum liggur heilt aftur til tíðina, tá Hósvík lá saman við Hvalvík í eini kommnu.

– Tað eru summi fólk, sum enn ganga og minnast aftur á, at tá skuldi einki henda i Hósvík. Alt varð lagt í Hvalvík, siga tey. Og hetta kemur so til sjóndar enn, hóast kommunurnar fóru sundir í 1955, sigur hann.

Hann heldur tað vera løgið, at slíkt kann ávirka fólk enn. Væl var ikki tað stóra í Hósvík fyri 50 árum síðan. Men her er nógv broytt, og tað er ikki bara av tí, at Hósvík gjørdist egin kommuna. Tað eru aðrar umstøður, sum hava gjørt tað, staðfestir hann. Hósvík var heppin, tí menningin i samfelagnum yvirhøvur kom júst, tá loyst varð.

Nú broytist so aftur, og politiska rákið í løtuni er tað, at nú skulu kommunurnar sjálvar taka sær av alt fleiri málum. Og tá fer at standa á hjá 280 fólkum at lyfta.

Men nú mugu so hesi somu fólk, sum hava valt hetta, taka um endan, sigur borgarstjórin í Hósvík. Sjálvur fer hann at verða sitandi, til valskeiðið er liðugt, men so er eisini liðugt við tí, sigur hann. So mugu tey, sum ikki vildu leggja saman, taka yvir.

Men hann væntar, at tað kann verða skjótt, at tey fara norður eftir við taskuni at biða lova sær uppí. Tí at liggja einsamallur so lítil kommuna millum tvær stórar, fer at merkjast. Tá verður lítið, sum lagt verður í Hósvík, væntar Jógvan Mørkøre.

Jógvan Mørkøre stilla rikki upp aftur til komandi kommunuval, sigur hann. Honum hevur dámt væl at verið við, men nú metir hann ikki, at grundarlag er fyri at halda fram, sum støðan er.



*Hóast Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í Hósvík, gjørdi sítt til, at Hosvík fór upp í nýggju Sunda Kommunu, valdi ein meiriluti borgarunum í bygdin at standa uttanfyri. Ein avleiðing er so, at borgarstjórin leggur frá sær, tá valskeiðið er úti*